

Leygardagin 8. oktober verður fyrsta húsvogna- og húsbilafelag í Føroyum stovnað

# Fyrsta húsvogna- og húsbilafelag í Føroyum

**Í samband við at fyrsta húsvogna- og húsbilafelag í Føroyum verður stovnað, verður fundur í MBM -húsinum leygardagin 8. oktober. Fyrireikararnir siga, at øll, ið eru áhugaði í at taka lut, eru meira enn vælkomin á fundin**

HÚSVOGNAR

Fyri umleið einum mánaði síðani kundu fólk lesa í bløðunum, at ætlanin var at stovna eitt felag fyri allar húsvagna- og húsbilaeigarar í Føroyum. Ivan Skorheim, ið sjálvur hevur húsvogn, hevur í longri tíð havt ætlanir um at tikið stig til at stovna eitt felag, og setti tí eina lýsing í bløðini fyri at síggja, um áhugi var fyri tí.

Tað vísti seg skjótt, at áhugin var størri enn væntað. Fleiri ið ringdu søgdu, at tey ofta høvdu hugsað um tað sama, men at manglandi intiativ gjørdi, at hetta ikki bleiv til veruleika.

Ivan sigur, at hann var ovfarin av øllum teimum e-mailum og telefon uppringingum, ið hann fekk frá fólki í vóru áhugað.

Nú, ein mánað seinni, verður stovnandi fundurin fyri allar húsvogna- og húsbilaeigarar í Føroyum. MBM hevur lagt hús til, meðan Breyðmolin í Fuglafirði kemur við køkum og øðrum ábiti.

Fyrireikararnir siga, at øll, ið eru áhugað at taka lut, eru meira enn vælkomin til MBM í Hoyvík. Fundurin verður leygardagin 8. oktobur kl. 15.00 og Ivan Skorheim sigur, at stuttligt hevði tað verið, um fólk tóku vognar sínar við til tiltakið. Um so er, at vognar verða tiknir við, skulu teir møta kl. 14.30.

# Porsche Panamera sedan við 4 hurðum





Í 2009 er ætlanin at Porsche Panamera sedan við 4 hurðum skal koma á marknaðin

**Í úti við 50 ár merkti navnið Porsche tað sama sum sportsvognur. Men fyri nøkrum fáum árum síðan kom Porsche jeepurin Cayenne, og nú verður arbeitt við at hava ein sedan við 4 hurðum kláran til 2009**

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Ein Porsche sedan við 4 hurðum kemur eftir ætlan á marknaðin í 2009. Talan verður um Porsche Panamera, sum í fyrstu syftu kemur við V8 motori (farmman) og verður drivin av bakhjólunum. Seinni koma útgávur við V6 og V10 motori.

Allir Porsche uttan jeepurin Cayenne, hava gjøgnum tíðirnar havt motorin aftan ella í miðjuni, men hesin hevur eins og Cayenne motorin framman.

Talan verður um eina satsing hjá Porsche, men sum myndirnar sýna, sær bilurin gott út, og einki er at ivast í, at talan er um ein Porsche. Tekniskt verður bilurin ógvuliga líkur Porsche Cayenne.

Panamera kemur á marknaðin í 2009, og roknað verður við, at bilurin fer at kosta umleið 2,5 mill. krónur í Danmark.

Brabus E V12 Biturbo:

# Heimsins kvikasti sedan

**Mercedes-Benz tunararnir Brabus hava gjørt heimsins skjótasta sedan higartil. Talan er um ein Mercedes E við V12 motori og 640 hk. Undir eini royndarkoyring í Italiu kom bilurin upp á yvir 350 km/t**

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



Hesin Brabus E V12 koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,5 sek. og koyrdi 350,2 km/t á eini royndarbreyt í Italia

Fyritøkurnar sum tuna bilar kappast alla tíðina um hvør kann gera tann kvikasta bilin, og tann sum kann koyra við mest ferð.

Brabus er ein týsk fyritøka, sum tunar Mercedes-Benz bilar. Bilarnir eita Brabus, men hava ikki tað eyðkendu Mercedes-stjørnuna á motorhjálminum.

Hesin Brabus E V12 Biturbo er heimsins kvikasti sedan. Á eini royndarbreyt í Italiu , kom ferðin upp á 350,2 km/t. Motorurin er ein 6,3 litur við tveimum turboløðarum og aðrari útgerð, soleiðis at hann hevur 640 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,5 sekund, 11,7 sekund frá 0-200 km/t og 30,6 sekund frá 0-300 km/t.

Mercedes-Benz nýta annars ikki V12 motorar til E-klassan.